FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 7. oktober 2020
J. nr.: 20/00444-2
Viðgjørt: AE

Svar til skrivligan fyrispurning frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, um túratalið hjá Rituni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismann í fíggjarmálum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hví siglir Ritan ikki tilkallitúr kl. 18.30 til Fugloyar, men bara til Svínoyar?

2. Tá fíggjarlógin fyri 2020 varð samtykt, vóru sekshundraðtúsund krónur settar av til at økja um túratalið út í Fugloynna og Svínoynna. Hvat er hesin peningur brúktur til?

3. Hvussu nógv er túratalið til Svínoynna økt?

4. Hvussu nógv er túratalið til Fugloynna økt?

Svar
Ynski eru javnan frammi um at økja túratalið hjá Strandfaraskipum landsins á Oyggjaleiðum og Bygdaleiðum. Ynski hevur verið um at økja túratalið til Fugloy og Svínoy. Ein slík øking má taka atlit til fíggjarlig viðurskifti og trygdarviðurskifti.

Strandfaraskip landsins leggur virksemið soleiðis til rættis, at á teimum leiðum har tøka arbeiðstíðin ikki hevur verið brúkt til fulnar, hevur manningin verði sett í niðursettan brøk. Túrurin úr Hvannasundi og út á Eiðið í Svínoy, tekur bert hálvan tíma. Brøkurin hjá manningini var 0,9 á farleiðini, og varð hann hækkaður til fulla tíð, sum røkkur til ein túr afturat í ein mánað.

Um tíðarskeiðið har siglt verður til Fugloyar var longt á saman hátt, hevði tað sambært Strandferðsluni merkt, at tveir mans skulu setast afturat til hvørja vakt. Tað hevur ein stóran meirkostnað við sær.

Viðvíkjandi trygdarviðurskiftum, so eru atløguviðurskiftini á Kirkju als ikki nøktandi. Strandferðslan hevur verið í drúgvum samskifti við Sjóvinnustýrið um málið, og hevur verið uppá tal at givist við at sigla uppá Kirkju. Ábøtur eru nú gjørdar á bryggjuni, sum er ein fyribils loysn.

Eftir fíggjarlógaruppskotinum hækkar játtanin frá 2,2 mió kr. til 5,0 mió kr., til havnir, til at gera ábøtur og umvælingar av atløgubryggjum. Landsstýrismaðurin hevur heitt á Landsverk, um at fyrireika málið, at gera eina varandi og trygga loysn á lendingarviðurskiftunum á Kirkju.

Tað er sera umráðandi at ferðasambandið til útoyggjar er gott, soleiðis at trivnaðurin er í lagið, og at bygdirnar kunnu mennast. Landsstýrismaðurin við tryggja, at ferðasambandið til Svínoyar og Fugloyar er nøktandi.

Tinganes, 7. oktobur 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður